# Tvær ferðir á tindinum

**Simona Dziugyte tykist vera leikarin, sum megnar flestu málini í einstøku dystunum**

METSKJÓTING
*Jákup Mørk*



*Simona Dziugyte var flúgvandi sunnudagin, og 16 ferðir noyddi hon VÍF-málverjan í meskarnar eftir bóltinum*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Tá Simona Dziugyte við brotskasti legði Neistakvinnurnar á odda 26-25, var hon helst óvitandi um, at hon samstundis skrivaði eitt lítið pettið av føroyskari hondbóltssøgu.

Seinastu fimm kappingarárini er tað nevnliga tvær ferðir áður komið fyri, at kvinnuligur leikari í einum og sama dysti hevur skotið 16 mál. Og tá Simona samstundis er onnur av teimum, sum hevur framt hetta áður, so er skjótt at staðfesta, at hon – roknað á hendan hátt – er vandamiklasta hondbóltskvinnan í landinum. Hin leikarin, sum hevur skotið 16 mál í sama dysti er annars Gabrielle Fekete, sum leikti við VB fyri tveimum árum síðani, men hon er ikki longur aktiv á føroysku klettunum.

Hóast tað javnan kemur fyri, at leikari skjýtur stóran part av málunum í einum dysti, so er tað meira sjáldsamt, at hálvgum runda 15-talið verður rundað. Soleiðis var hetta bert 12. ferðin, at hetta er komið fyri, tá vit rokna frá og við kappingarárinum, 1999/2000. Undan hesum er tað tó onkra tíð komið fyri, og eitt nú fingu vit í fjør staðfest, at Egil Johansen í 1977 skeyt 21 mál, tá Stjørnan vann 29-22 á StÍF.

Hvørt hetta er met ella ikki, fáa vit tíverri ikki staðfest. Hagtalsgrundarlagið fyri hondbóltslandskappingina er tíverri ov veikt í so máta, men her er so listin við teimum, sum hava skotið 15 mál og fleiri í sama dysti seinastu fimm kappingarárini.

**17 mál**

| | | |
|---|---|---|
| 2002/03: | Áki Mørk (Neistin), | KÍF-Neistin |
| 1999/00: | Áki Olsen (Neistin), | Neistin-Tjaldur |

**16 mál**

| | | |
|---|---|---|
| 2003/04: | Simona Dziugyte (Neistin), | Neistin-VÍF |
| 2001/02: | Gabrielle Fekete (VB), | StÍF-VB |
| 2001/02: | Simona Dziugyte (Søljan), | Søljan-Stjørnan |
| 2001/02: | Heini Hanusarson (Neistin), | Neistin-H71 |

**15 mál**

| | | |
|---|---|---|
| 2001/02: | Bjarni Wardum (H71), | StÍF-H71 |
| 2001/02: | Heini Hanusarson (Neistin), | VÍF-Neistin |
| 2001/02: | Asta Petrauskiene (Søljan), | Søljan-Kyndil |
| 2001/02: | Ioana Rápa (VÍF), | Søljan-VÍF |
| 2000/01: | Gurið Mortensen (VB), | Tjaldur-VB |
| 1999/00: | John Petersen (StÍF), | VÍF-StÍF |

# Svimjidómara-/ hjálparfólkaskeið

**Miðvíst arbeiði verður nú gjørt, til tess at hækka støðið hjá dómarum og hjálparfólki til svimjikappingar**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Til eina svimjikapping krevst nógv hjálparfólk. Við dómarum,tíðtakarum o.ø. er tørvur á okkurt um 15-20 fólkum til hvørja kapping.

Ein av teimum, ið hevur virkað sum høvuðsdómari gjøgnum nógv ár, varð Jon Hestoy. Jon hevur eisini verið altjóða dómari síðan ár 2000 og hevur hann tískil dømt fleiri kappingar uttanfyri landoddanar eisini.

Saman við Jon, hevur Sørin S. Djurhuus í nógv ár virkað sum startari. Sørin hevur so tikið eftir Jon til fleiri av okkara heimligu kappingum og er hann í dag eisini altjóða startari og yvirdómari.

Hetta seinasta árið hava teir báðir, Jon og Sørin, arbeitt við at føroyska frálærutilfar, sum kann nýtast til tey, ið hava hug at fáa eitt grundskeið í svimjireglum og annars ynskja at gera sítt til at skapa eina góða kapping. Síðan hevur Sørin havt skeiðir runt í landinum og stóð ymisku svimjifeløgunum tí í boði at taka lut. Fyrsta skeiðið var í Suðuroy í mai mánaða, har 23 luttakarar luttóku. Síðan varð farið til Klaksvíkar og Havnar, har ávíkavist 5 og 11 vóru við. Fyri 14 døgum síðan varð skeið hildið á Kambsdali fyri svimjifeløgunum í Eysturoynni og vóru har 27 luttakarar.

Støða er tikin til, at tað í framtíðini skal vera upp til svimjifeløgini, at boða frá um tey hava nøkur ið ynskja hjálparfólkaskeiðið.

Er áhugi, kann ein seta seg í samband við Sørin S. Djurhuus á tlf. 210667 ella á t-post: sorin-d@post.olivant.fo



*Tjóvstartur ella ikki. Tað er upp til dómaran, men nú skulu hesir fáa betri upplæring*
*Mynd: Øssur Mohr*

# HSF tekur eingi stig

**Í kappingarnevndini hjá Hondbóltssambandinum skilja tey ikki, at VB framvegis ikki torir at nýta útlendsku leikararnar**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*



*Einasti útlendingurin, sum VB torir at gera nýtslu av í løtuni, er Daiva Toumaite, men hon hevur skaða at dragast við, og fær tí ikki við*

Sum tað framgongur aðra staðni á hesum síðum, so tykjast tey í VB framvegis ikki vilja gera nýtslu av útlendsku leikarunum, sum óviljað endaðu í sentrum av útlendingamálinum í føroysku hondbóltskappingini.

Í ítróttartíðindunum leygarkvøldið staðfesti Bogi Mortensen, at so leingi málið er parkerað, so vilja tey ikki nýta leikararnar.

– Vit vilja binda um heilan fingur, vóru boðini, sum formaðurin í hondbóltsdeildini hjá VB hevði at bera, tá hann varð spurdur um, hvørt tey framvegis ikki kundu gera nýtslu av leikarunum.

Í hesum blaðnum skrivaðu vit annars í farnu vikuni, at nú kundu tær báðar útlendsku kvinnurnar loksins fara at spæla hondbólt aftur, og sambært kappingarnevndini hjá HSF, so tykist tað heldur ikki vera nøkur forðing fyri, at so kann verða.

– Nú hava vit als ikki viðgjørt hetta málið, men sjálvur rokni eg ikki við, at tað kann koma upp á tal at frádøma VB nøkur stig. Heldur ikki um tað skuldi víst seg, at leikararnir ikki hava loyvi at vera í Føroyum. sigur Julian Olsen vegna kappingarnevndina.

– Einastu ferð, at vit hava verið íblandaðir málinum, var tá leikloyvið varð útskrivað til VB. Tá kannaðu vit eftir, hvørt leikararnir vóru leysir av fyrrverandi feløgunum, og hvørt skiftið var í tráð við EHF-reglurnar, og annað enn tað hava vit so ikki gjørt, sigur hann.

### Ikki upp til fútan

Spurningurin hevur annars verið reistur, hvørt VB kann dømast at missa stigini, sum tær hava fingið við útlendsku leikarunum á liðnum, um fútin skuldi komið til ta niðurstøðu, at leikararnir skulu av landinum, og at tær ongan tíð hava havt loyvi at spæla við VB.

At byrja við vóru boðini frá fútanum annars, at tær ikki kundu spæla hondbólt her á landi, tá tær ikki høvdu arbeiðsloyvi. Men hóast hesa rættarligu staðfesting, so ber illa til at ímynda sær, at hesi boðini verða fylgd á stigatalvuni.

Sum útinnandi valdið innan hondbóltin er tað fyrst og fremst HSF, sum ger av, hvørt leikarar hava loyvi at spæla í kappingini ella ikki, og tað hava tær báðar VB-kvinnurnar. Um tær so hava loyvi at vera í landinum ella ikki er eitt heilt annað mál, sum kann viðføra útvísing og mist leikloyvi. Men tað er í øllum førum ilt at ímynda sær, at ein frátøka av leikloyvinum kann gerast við afturvirkandi kraft.



# Kappingin stendur millum Kollafjørð og Klaksvík

**Enn eru nógv umfør eftir, men í løtuni eru tað tvey lið í serklassa í 1. deild, meðan hini fýra liðini í deildini tykjast jøvn**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



Eftir trimum umførum liggja kollfirðingar og klaksvíkingar nærum lið um lið í oddinum. Bæði liðini, sum hava vunnið sínar tríggjar dystir, hava ávíkavist tíggju og nýggju stig. Toftamenn eru á einum triðja plássi við fimm stigum, men bert hálvtannað stig er niður til sandavágsmenn, sum eru aftastir.

Kollfirðingar høvdu bæði leygardagin og sunnudagin svenska kenningin og stórmeistaran Tiger Hillarp-Persson við á liðnum. Móti Sandavági leygardagin eydnaðist tað Torkili Nielsen at leika javnt móti Tiger. Dysturin endaði 3,5 — 0,5 til oddaliðið.

Hinir dystirnir leygardagin vórðu millum Toftir og Klaksvík og Hvalvík og Havnina. Klaksvíkingar vunnu ein tryggan 3-1 sigur á toftamonnum. Ólavur Simonsen vann eitt gott talv á fyrsta borði móti Boga Ziska. Talvið er við í blaðnum í dag.

Hvalvíkingar við Rógva W. Rasmussen á fyrsta borði, leikti 2-2 móti havnarmonnum. Olaf Berg vann uppgerðina á fyrsta borði.

### Kollfirðingar sorlaðu havnarmenn

Sunnudagin varð tann klassiski HT-KT dysturin á skránni í Havnini. Eitt sterkt og styrkt kollfjarðalið vundu burturúr einum rættiliga skerdum havnarliði. 4-0 bleiv úrslitið. Við GM Tiger, Hans Kristian Simonsen, Torbjørn Thomsen og Eyðálvi Johannesen á liðnum, eru kollfirðingar favorittar at vinna FM-heitið. Tiger verður allarhelst ikki oftani við, eftirsum hann eisini telvar við í svensku og donsku liðkappingini, men sjálvt uttan hann er liðið sterkt. Tiger vann á Olaf, eftir at Olaf kom illa frá byrjanini. Hans Kristian vann í einum annars jøvnum talvi á Herluf Hansen.

Hví havnarliðið er somikið skert, er ilt at siga. Martin Poulsen er í Ungarn og telvar enn eina kapping, men eitt nú kundi ein Haldur Suni Johansen styrkt alsamt um liðið. Uttan at taka nakað frá teimum sum mannaðu 3-4. borðini, so eigur eitt stórt felag sum Havnar Telvingarfelag at hava sterkari manning. Ein kundi eisini spurgt, hví ikki geva teimum ungu ein kjans í fremstu røðini, um tað alíkavæl ikki er møguligt at hava nóg sterk 3-4. borð? Her verður serliga hugsað um Helgi D. Ziska og Rógva Mortensen, sum eru tveir lovandi unglingar.

Klaksvíkingar við Ólavi Simonsen í góðum formi vunnu somuleiðis stórsigur sunnudagin. Bert hálvt stig fingu hvalvíkingar, sum Finnbjørn Zachariassen fekk ímóti Rana Nolsøe. Ólavur vann á Martin Brekká, sum yvirtók fyrsta borðið frá Rógva, ið ikki leikti við móti klaksvíkingum.

Toftamenn vunnu botndystin móti sandavágsmonnum. Tríggir javnleikir, eitt nú millum Torkil Nielsen og Jens Kristian Hansen, og ein sigur sum aldursforsetin og heiðurslimurin í føroyskari telving Jústines Hansen stóð fyri, tá hann vann á einum øðrum veterani, Gutta Petersen.

Spennandi verður at fylgja tvídráttinum millum kollfirðingar og klaksvíkingar. Hini liðini fara helst at berjast um bronsuna, og undan niðurflyting.



*Hans Kristian Simonsen og liðfelagarnir úr Kollagirði góvu havnarmonnum bank hetta umfarið*

### Enn einaferð eingin vinnari

Í seinasta talvteigi frættu vit at Kasparov hevði vunnið triðja talvi í dystinum móti heimsins sterkastu talvteldu, Fritz. Støðan varð tá 1,5 — 1,5, og eitt talv restaði í. Fritz hevði hvíta fólkið í hesum seinasta talvið, fekk ein lítlan fyrimun, men tá Kasparov út ímóti miðspælinum valdi ein tryggan leist, varð tað torført hjá báðum pørtum at bróta ígjøgnum, og djúpt inni í endatalvinum bleiv javnleikur úrslitið.

2-2 og enn vita vit tí ikki við vissu hvør hevur munin, menniskjan ella tøknin. Kasparov vardi mannættina væl, og prógvaði í øllum førum, at enn er skaparin ikki í undirluta í mun til skapanarverkið.

## Talvstøður

### 1. deild 2. umfar

| | | | |
|---|---|---|---|
| TT | KTF | | 1-3 |
| Bogi Ziska | Ólavur Simonsen | | 0-1 |
| Andreas Andreasen | Rani Nolsøe | | 0-1 |
| Helgi Joensen | Finnbjørn Vang | | 1-0 |
| Øssur Hansen | Tummas M. Anthoniussen | | 0-1 |
| TFS | HT | | 2-2 |
| Rógvi W. Rasmussen | Olaf Berg | | 0-1 |
| Martin Brekká | Herluf Hansen | | 0-1 |
| Finnbjørn Zachariassen | Óli Joensen | | 1-0 |
| Sámal Christiansen | Sigurð Justinussen | | 1-0 |
| KT | ST | | 3,5-0,5 |
| Tiger Hillarp-Persson | Torkil Nielsen | | 0,5-0,5 |
| Hans Kristian Simonsen | Sonni Nielsen | | 1-0 |
| Eyðálvur Johannesen | Jónfinn Thomsen | | 1-0 |
| Grettir Djurhuus | Gutti Petersen | | 1-0 |

### 1. deild 3. umfar

| | | |
|---|---|---|
| KTF | TFS | 3,5-0,5 |
| Ólavur Simonsen | Martin Brekká | 1-0 |
| Rani Nolsøe | Finnbjørn Zachariassen | 0,5-0,5 |
| Finnbjørn Vang | Sámal Christiansen | 1-0 |
| Tummas M. Anthoniussen | Gunnar Joensen | 1-0 |
| ST | TT | 1,5-2,5 |
| Torkil Nielsen | Jens Christian Hansen | 0,5-0,5 |
| Sonni Nielsen | Andreas Andreasen | 0,5-0,5 |
| Jónfinn Thomsen | Helgi Joensen | 0,5-0,5 |
| Gutti Petersen | Justinus Hansen | 0-1 |
| HT | KT | 0-4 |
| Olaf Berg | Tiger Hillarp-Persson | 0-1 |
| Herluf Hansen | Hans Kristian Simonsen | 0-1 |
| Jógvan Joensen | Torbjørn Thomsen | 0-1 |
| Ingi Kirke | Eyðálvur Johannesen | 0-1 |

### Støðan í 1. deild

| | |
|---|---|
| 1. KT | 10 |
| 2. KTF | 9 |
| 3. TT | 5 |
| 4. HT | 4,5 |
| 5. TFS | 4 |
| 6. ST | 3,5 |

### 2. deild, 2. umfar

| | | |
|---|---|---|
| KTF2 | VT | 1-3 |
| HT2 | RT | 3-1 |
| KT2 | VT2 | 2-2 |

### 2. deild, 3. umfar

| | | |
|---|---|---|
| RT | KTF2 | 2-2 |
| VT | KT2 | 3,5-0,5 |
| VT2 | HT2 | 0-4 |

### Støðan í 2. deild

| | |
|---|---|
| 1. HT2 | 10 |
| 2. VT | 9,5 |
| 3. KT2 | 5,5 |
| 4. RT | 4 |
| 5. KTF2 | 4 |
| 6. VT2 | 3 |

## Talvið hesa vikuna

**Ólavur Simonsen (2229) - Bogi Ziska (2129)**
FM-lið 2003/04 ( 2.umfar) 22.11.2003

**1.e4 c5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 g6 4.0—0 Bg7 5.c3 Rif6 6.d4!** (Soleiðis hava vit kent Ólavur í mong ár. Kompromileys telving, har finnur hansara verða offraðar fyri gott spæl) **6...Rixe4** (Átti Bogi at tikið ímóti gávuni? Møguliga, men nú biðjur hann um tað sjálvur. Ólavur kundi neyvan verið fegnari, finnu minni og støðan óbalanserað, hjá svørtum í øllum førum) **7.d5! Rid6 8.Bd3 Rie5 9.Rixe5 Bxe5 10.Re1 Bf6** (10...Bg7 11.Bg5 er gott hjá hvítum) **11.Bh6** (Svartur tykist longu nú trælabundin) **11...Fb6 12.Ff3 Kd8** (Hvítur hótti Fxf6) **13.Bf4 g5!** (Góður verjuleikur) 14.Be3?! (Kanska einasti feilur hjá Ólavi í talvinum. Bxd6 og Ria3 sær vinnandi út. Nu eigur Bogi helst at leika 14...Fxb2 fyri at halda sær í hitanum...) **14...Fc7? 15.Ria3 h5 16.Rab1 a6 17.b4** (Læsir upp støðuna) **17...c4 18.Rixc4! Rixc4 19.Bxc4 g4** (Eftir Fxc4, kemur Bb6+ og Fxf6) **20.Fe4 d6 21.Bb3 Fxc3** (Nakað djarvt. Ólavur leitar nú eina vakra og avgerandi kombinatión fram) **22.Rbc1 Fe5 23.Ba4** (Við hóttanini Bb6+ mát) 23...b5



**Støðumynd eftir 23...b5**

**24.Fc4!!** Og Bogi gavst. Frúgvin kann ikki takast vegna Bb6+ mát. Besta verjan er 24...Bd7, men eftir 25.Fc7+ Ke8 26.Fb7 Rd8 og 27.Bb6 vinnur hvítur lættliga. Eitt flott og klassiskt talv av Ólavi **1—0**